**Góðu borgarar í Sørvágs kommunu!**

Enn eitt ár verður um skamma stund lagt afturum. Aftur mugu vit ásanna: "Tíðin rennur sum streymur í á."
Árið, ið runnið er, er á mangan hátt sermerkt.
Nýtt bygdaráð er valt, og fleiri limir í bygdaráðnum eru nývaldir.
Fyrsta árið hevur verið ein avbjóðing, og vón okkara er, at borgararnir eru nøgdir við tað, vit fólkavaldu hava avrikað.

Vit líta í treysti fram ímóti tí nýggja árinum.

**Ein kommuna**
Við ársbyrjan gjørdust vit fýra bygdir í kommununi. Fyrsta árið hevur víst, at vit (á mangan hátt) hoyra saman og hava brúk fyri hvørjum øðrum.
Fyrsta árið sum ein kommuna – ið fevnir um bygdirnar Sørvág, Bø, Gásadal og Mykines – royndist væl og vóna vit, at borgararnir halda tað sama.

**Mykines**
Vestasta oyggin við tí sermerktu náttúruni er eitt nógv umbiðið ferðamál. Hetta setur stór krøv til okkum sum borgarar og myndugleika.

Fjarstøðan til restina av kommununi ger samskiftið við borgararnar trupult. Fyri at lætta um hjá íbúgvunum í Mykinesi, setti kommunan Kjeld Nattestad í parttíðar starv.
Hann skal taka sær av ymiskum kommunalum uppgávum á staðnum.
Sum liður í at varðveita staðarnøvn í Mykinesi, hevur kommunan útvegað sær amboð til skráseting av staðarnøvnum og til at gera hesi teldutøk. Steingrím Abrahamsen – sum er staðkendur í Mykinesi – er í ferð við at gera hetta arbeiðið.

**Gásadalur**

Bygdin Gásadalur, við tí stórslignu náttúruni, er nú ein partur av megin-økinum.
Hóast arbeitt hevur verið áhaldandi við tunlinum, er enn eftir at lata hann upp fyri almennari ferðslu. Væntandi verður tunnilin endaliga liðugur í komandi ári. Inntil tunnilin endaliga er góðkendur til almenna ferðslu, er øll ferðsla undir egnari ábyrgd. Kommunan eigur lendi til nøkur grundøkir í Gásadali, sum eru ætlaði til vanliga sethúsabygging, og við hesum møguleika at seta búgv, er tað vón okkara, at fólkatalið í Gásadali aftur fer at vaksa.

**Bøur**

Við útsýni móti Tindhólmi og Drangunum er Bøur tað staðið, har flestu náttúrumyndir verða tiknar í Føroyum. At Bøur er ein góð bygd at búgva í, er sjón fyri søgn: Barnatalið er høgt – og tað er at fegnast um. Lítli fótbóltsvøllurin er um at verða liðugur og vóna vit, at børn og ung dúgliga fara at gera nýtslu av honum. Kommunan hevur grundøkir tøk í bygdini, og er áhugi fyri at seta búgv har.

**Sørvágur**

Bygdaráðið tók stig til at leggja nýtt graslíki á fótbóltsvøllin í ár. Hetta hevur skapt størri trivna í bygdini.
Vit ynskja, at tað ágrýtni, sum ung-dómurin hevur, eisini í komandi ári kann seta okkara kommunu á landa-kortið.
Undanfarna bygdaráð setti skjøtil á ætlanina at fáa seyðin av bønum í Sørvági alt árið. Enn er ikki komið á mál, men ætlanin er at arbeiða víðari við hesum.

**Byggisamtykt fyri alla kommununa**
Tað er av stórum týdningi, at allir borgarar í kommununi verða viðgjørdir eins.
Tí samtykti bygdaráðið, at byggisamtykt skal gerast fyri bygdirnar Bø, Gásadal og Mykines. Byggisamtyktirnar verða gjørdir eftir sama leisti sum tann, sum er galdandi fyri Sørvágs bygd.
Hetta er drúgt arbeiði, og tekur langa tíð at fáa frá hondini. Ætlandi náa vit á mál við byggisamtyktunum í hesum valskeiðinum.
Í hesum sambandi er av stórum týdningi at tryggja, at bygdirnar Mykines og Gásadalur varðveita síni sereyðkenni og samstundis fáa møguleika fyri menning. Eingin ivi er um, at hesar bygdir í kommunu okkara eru serstakar, og eiga at liggja fremst, tá talan er um menning av ferðavinnu.

**Gøtunøvn**
Arbeiðið við at skipa gøtunøvnini í kommununi er ígongd. Ymiskt er, hvussu langt áleiðis hetta arbeiðið er komið. Í Sørvági er hetta um at verða liðugt, og húsanummar er komið á øll hús og bygningar.
Í Bø er uppskot til nøvn á vegum og gøtum klárt. Eftir er at fáa hesi góðkend hjá myndugleikunum. Tekniska nevnd fer fyrst í komandi ári at skipa soleiðis fyri, at vegir og gøtur í Gásadali og Mykinesi eisini fáa nøvn.

**Fríðkan av bygdunum**
Á fíggjarætlanini fyri komandi ár hevur bygdaráðið avgjørt at seta pening av til fríðkan av bygdunum. Hetta er sjálvandi nakað, sum allar kommunur í roynd og veru gera hvørt ár. Men tað er sera jaligt, at bygdaráðið sær møguleikan í at gera serlig átøk hesum viðvíkjandi komandi ár.
Fyri at koma hesum máli nærri, hevur bygdaráðið samtykt at søkja eftir og seta ein laðingarmann til endamálið.

**Eldraøkið**
Eldrarøkt er landsmál, tí kunnu kommunurnar hava trupulleikar at betra hetta økið. Felagskommunan hevur seinastu 2 árini arbeitt við málinum, og hava kanningar víst, at tørvur er á sambýlum í oynni.
Av tí at Felagskommunan í Vágum framhaldandi arbeiðir við málinum, bíðar bygdaráðið eftir eini niðurstøðu, áðrenn støða verður tikin til eina møguliga útbyggingarætlan.

**Summarhús**

Bygdaráðið fer í komandi ári at kanna møguleikan at økja um ferðavinnumøguleikarnar í kommununi – ítøkiliga byggir ætlanin á at skapa møguleikar fyri summarhúsbygging, og er endamálið at økja um og menna vinnumøguleikarnar í kommununi.

Tað er tekniska nevnd, sum saman við vinnunevndini skal taka sær av viðgerðini og gera tilmæli til bygdaráðið um, hvussu farast skal fram.

**Nýggjur barnaansingarstovnur**

Arbeiðið við nýggja barnaansingarstovninum gongur sum ætlað, og roknað verður við, at stovnurin verður liðugur at taka í nýtslu eftir summarfrítíðina 2006.

Bygningurin er samanlagt uml. 1.100 m$^2$ til víddar, harav ein partur er á lofti og í kjallara.

Tað er Berg Rasmussen, byggimeistari, sum stendur fyri byggingini, sum West Tech Sp/f hevur prosjekterað.

Endamálið við bygninginum er at skapa hóskandi karmar fyri barnaansing og eisini at lata upp fyri møguleikanum at savna saman tær ymisku ansingarskipanirnar, sum í dag eru býttar sundur millum barnagarð, dagrøkt og frítíðarskúla.

Í skipanini, sum fevnur um Sørvág, Bø og Gásadal, eru samanlagt uml. 97 børn.

Býtið er nú soleiðis:

| | |
|---|---|
| Barnagarðurin Sýslan: | 41 børn |
| Dagrøktin í Sørvági: | 30 børn |
| Dagrøktin í Bø: | 11 børn |
| Frítíðarskúlin: | 15 børn |

Við nýggja barnaansingarstovninum sum grundarlagi, verður arbeitt við at um- og samskipa ansingarøkið.

**Skúlin**

Ungur nemur gamal fremur - soleiðis sigur orðatakið. Teldan er eitt amboð, sum seinastu áratíggjuni er ment almikið, og tí er tað av stórum týdningi at okkara ungu fáa ment seg á hesum øki.
Leiðsla skúlans hevur ynski um at útvega skúlanum nýmótans teldur, og bygdaráðið hevur tí avsett pening til endamálið.
Partur av skúlabygningunum er gamal og krevur størri umvælingar, t.d er takið á eldra partinum av skúlanum í ringum standi. Ætlanin er at gera eina heildarætlan fyri umvælingar og møguligum umbyggingum av skúlanum.

**Ungdómstiltøk**

Ungdómurin er virkin á nógvum økjum í kommunu okkara. Í heyst tóku Thordis Lorenzen og Erik Hansen stig til skótaarbeiði í Sørvági, og rættuliga nógv børn taka lut á fundunum. Skótarnir halda til í róðrarneystinum.
SÍ hevur á serligan hátt gjørt kommunu okkara kenda seinastu árini. Tað megnar avrik, leikarar og leiðarar gera, hevur stóra ávirkan á trivnaðin í bygdini.
Stórar avbjóðingar standa fyri framman, og vit bíða spent til næsta bríksl!
Ein bólkur av ungdómi og leiðarum, sum í tí dagliga ikki gera so nógv hóvasták burtur úr sær, eru tey, sum kvøld eftir kvøld, koma saman í missiónshúsinum, tykkum vil bygdaráðið eisini bera eina stóra tøkk.

**Barnaverndin**

Landsstýrið álegði øllum kommunum við minni enn 1.500 fólkum at samarbeiða um barnaverndararbeiði. Eftir langar og drúgvar samráðingar við 4 kommunur í Vágum og Norðstreymi, skrivaði Sørvágs Kommuna undir samarbeiðsavtalu um felags barnavernd.
Hetta merkir, at eftir 1. januar 2006 verður borgarin at samskifta við barnaverndarstovuna í Sandavági um barnaverndarmál.

**Drekkivatn**

Eitt nógv umtalað mál seinastu árini, er trupulleikin at fáa reint og gott drekkivatn. Í hesum máli síggjast nú glottar fyri framman.
Í Mykinesi er ein uml. 1.600 metur nýggj høvuðsvatnleiðing løgd niðan í hagan, og arbeiðið at gera klárt til reinsiverkið er komið væl áleiðis. Væntandi verður reint drekkivatn í Mykinesi komandi summar.
Vatnveitingin í Bø er í góðum standi, og reinsiverk er útvegað til endamálið.

Reinsiverkið í Sørvági er nú bílagt og verður uppsett fyrst í komandi ári. Enn er ikki greitt, nær vatnleiðingin frá Sørvágsvatni og niðan í bygdina verður liðug.
Í Gásadali eru ikki ítøkiligar ætlanir um reinsiverk.

**Brunamál**

Seinastu árini hevur Sørvágs Kommuna í samráð við Brunaumsjón Landsins viðgjørt brunamál, herundir tey amboð kommunan hevur til taks. Brunaumsjónin hevur greitt vísst á, at tørvur er á betri útgerð enn henni, vit hava í dag. Tí hevur bygdaráðið kannað, um møguleiki er fyri samarbeiði við sløkkiliðini handanfyri fyri at minka um íløgurnar hjá okkum. Men hetta er ikki ein fullgóð, nøktandi langtíðarloysn fyri okkara kommunu, og tí hevur bygdaráðið ætlanir um at útvega ein nýggjan sløkkibil til sløkkiliðið hjá kommununi.

**Nýggj útstykking í Hagagerði**

Kommunan er nú farin undir nýggju útstykkingina í Hagagerði. Undanfarna bygdaráð samtykti eina verkætlan fyri økið uppi á Mýrum og hevði eisini ognað sær lendi til útstykking og barnagarð, samanlagt uml. 32.000 m$^2$.
Fyrsti partur av útstykkingarætlanini fevnir um uml. 220 metur av vegagerð og gevur atgongd til 16 grundøkir, sum eru uml 600 m$^2$ hvørt. Ætlanin er at víðka um útstykkingina í komandi ári.



Vegagerðin er í høvuðsheitum liðug, og verður farið undir at leggja leiðingar fyrst í komandi ári. Arbeiðið er gjørt í samstarvi millum Bingo Transport P/f, K.J.O. Sp/f og Poul Niclasen eftir avtalu við kommununa.
Útstykkingin er prosjekterað av West Tech Sp/f.

Miðað verður ímóti, at koma so langt áleiðis við arbeiðinum, at farast kann undir sethúsabygging í apríl/mei komandi ári.
Arbeitt verður við at gera neyvar lýsingar av útstykkingarætlanini og einstøku grundøkjunum, fyri soleiðis at avmarka óhepnari plasering av einstøku sethúsunum. Ætlanin er at tryggja eitt ávíst útsýni, í tann mun hetta ber til, tó uttan at seta alt ov fastar karmar fyri byggisniði.
Í heildarætlanini fyri økið er atlit tikið fyri at samskipa fríøkið í útstykkingini og fyri barnagarðin. Gøta verður gjørd frá barnagarðinum og yvir til fríøkið, sum er avlagt miðskeiðis í økinum.

Talan er um eitt stórt fríøki uttan ferðslu, har møguleiki verður fyri at hava virksemi fyri ung og gomul í friðarligum umhvørvi.
Gøtan frá barnagarðinum verður løgd undir vegin. Samanbindingin millum fríøki og barnagarðin verður skipað soleiðis, at tað ikki verður neyðugt at fara um alfara veg.
Áhugin fyri at byggja í økinum er stórur, so vit vænta, at hesin parturin av útstykkingini verður liðugt bygdur innan stutta tíð.
Nærri verður kunnað um útstykkingina á heimasíðuni www.sorvag.fo

**Vegir**
Sum partur av at fríðka bygdina, kemur eisini t.d liðugtgerð av vegum. Undanfarna bygdaráð setti meira ferð á liðugtgerð av vegum og gøtum. Hesum er ætlanin at halda fram við.

**Á einum vegamóti**
Ein fyritøka, sum hevur havt sera, sera stóran týdning fyri kommunu okkara seinastu mongu árini er P/f Vesturvón.
Sørvágs Kommuna átti týðandi partapening í fyritøkuni til fyri stuttum, tá felagið varð selt øðrum.
Í skrivandi løtu veit undirritaði ikki, hvørjar avleiðingar eigaraskiftið fær fyri virksemið hjá felagnum, ella um felagið framhaldandi fer at virka í kommununi.
Vón okkara er, at tey, sum á ymiskan hátt eru rakt av hesum skifti, hava áræði at bróta upp úr nýggjum og troyta nýggjar ella royndar leiðir.

Sørvágs Kommuna hevur vilja og áhuga at skapa karmar, í tann mun tað ber til, fyri nýggjum og verandi fyritøkum.

**Havnarøkið og bátahylurin**

Í skjótt farna ári hevur kommunan gjørt fleiri ábøtur á havnarøkinum, nevnast kann, at nærum øll dekkini fram við keiini eru skift. Fortoyningar og brúgvaarmar eru umvældir, umframt aðrar smærri umvælingar. Ætlanin er at skifta fleiri brúgvaarmar út.
Long tíð er fráliðin, síðani bátahylurin var reinsaður fyri sand og annað tilfar. Kommunan hevur ætlanir um at reinsa bátahylin komandi ár.
Molahøvdið við innsiglingina til bátahylin hevur síni lýti og treingir til at fáa eina umvæling. Eisini er ætlanin at betra egningarumstøðurnar á landi. Peningur er settur av á komandi fíggjarætlan til at fáa hesi viðurskifti í rættlag.
Sera nógv virksemi hevur verið á keiøkinum í ár og er tað at fegnast um. Landingarmiðstøðin hevur í ár tikið ímóti uml. 6.300 tonsum, og flakavirkið Vestís P/f hevur tikið ímóti og virkað 1.200 tons.

**Alingin byrjar aftur**

Sum skilst fer alifyritøkan hjá Atla Gregersen undir aling á Sørvágsfirði komandi ár. Umframt aliøkið hevur fyritøkan eisini yvirtikið sláturvirkið og aðra útgerð í sambandi við alingina. Enn er ikki avgjørt um sláturvirkið verður tikið í nýtslu aftur, men nýtsla av hesum hevði havt stóra ávirkan á virksemi á havnarlagnum.

**Vága floghavn**

At Vága Floghavn hevur sera stóran týdning fyri menning og møguleikar, ikki bert hjá okkum her vesturi, men eisini hjá føroyingum sum heild, er eingin ivi um. Tað at hava møguleikar fyri skjótum, tryggum og góðum umstøðum í sambandinum millum lond er ein avgerandi fyritreyt.
Sum skilst verða ítøkiligar kanningar nú gjørdar av møguleikunum fyri at útbyggja flogvøllin, og skal tann tøkniligi parturin leggjast fyri Landsstýrið fyrst í komandi ári.
Um so verður, at Landsstýrið og løgting avgera at fara undir at útbyggja flogvøllin, verður tað frá okkara síðu mett, at arbeiðið kann byrja í 2007.

**Ídnaðarøkið**
Kommunan hevur seinastu nógvu árini verið eigari av einum 21.000 m² stórum ídnaðarøki norðan fyri flogvøllin. Økið, sum liggur vestanfyri bygningin hjá Landsverki, skal brúkast til ídnað, og hevur kommunan á fíggjarætlanini fyri 2006 avsett 2,0 mill kr. til partvísa byggibúgving.

**Vinnunevnd**
Á fundi 23 november í ár samtykti bygdaráðið eftir tilmæli frá borgar-stjóranum at seta eina nevnd, sum skal gera tilmæli til bygdaráðið í samb. við vinnu og menning.
Í nevndini sita Jógvan Páll Joensen, Sune Jacobsen og Erik Davidsen.

**Fólkatalið**
Hóast talið av nýggjum sethúsum í kommununi veksur í stórum, er fólkatalið ikki vaksið nakað. Bygdaráðið hevur tikið stig til at nøkta tørvin á grundøkjum, og vón okkara er, at hetta kemur at tryggja ein javnan vøkstur í fólkatalinum.
Í dag búgva 1.078 fólk í kommununi.

**Støðan í tølum**
Bygdaráðið hevur havt 15 bygdaráðsfundir í ár, og íalt 167 mál hava verið til viðgerðar.
Arbeiðsbyrðan hjá bygdaráðnum hevur verið stór og krevjandi hetta fyrsta árið. Men samanhald og virkisfýsni hjá nevndarlimunum hevur ikki trotið.

**Roknskapurin 2004**

Grannskoðaði roknskapurin fyri 2004 varð góðkendur á fundi hin 13. juni 2005.




Ársroknskapurin vísur ein javnvág á kr. 26.818.385.

Skattainntøkurnar vóru samanlagt kr. 21.100.160. Rakstrarútreiðslurnar kr. 15.903.178 og gjørdar vóru íløgur fyri samanlagt 4.484.513 kr.

Í mun til vanligan virkisroknskap, so verða allar kommunalar íløgur útreiðsluførdar í tí árinum, sum tær eru gjørdar. Hetta merkir m.a. at stórar broytingar kunnu verða í íløgunum frá ári til annað.

Sum víst omanfyri verða íløgurnar í 2005 mettar til samanlagt uml. 11,2 mió. Herav eru íløgur gjørdar í keyp av lendi til barnagarð, útstykking og bygningar á uml. 1,5 mió, nýggjan graslíkisvøll á uml. 2,0 mió., og bygging av barnagarði uml. 4,0 mió.

Viðmerkjast skal, at árið 2005 var tað fyrsta árið har kommunurnar Sørvágur, Bøur og Mykines vóru samanlagdar, so tølini kunnu ikki beinleiðis samanberast.

**Fíggjarætlan 2006**

Fíggjarætlanin fyri komandi ár varð við 3. viðgerð einmælt samtykt tann 07.12.2005.

Skattskylduga inntøkan verður mett til 126.490.589 kr. og er tað nakað minni enn undanfarna ár. Skattaprosentið verður óbroytt 19,75% og barnafrádrátturin 3.000 kr.

Við hesum sum grundarlagi verður mett, at skattainntøkan samanlagt verður uml. 24 mió. kr. í 2006. Tá er partafelagsskatturin, sum mettur til kr. 500.000, íroknaður. Felagsskatturin í ár verður uml. kr. 1.500.000.
Persónsskatturin higartil í ár er nakað hægri í ár enn mett.




Ein serlig hending sum hevur verið frammi í fjølmiðlunum, var tá Sørvágs kommuna gjørdist "rík." Hetta hendi sum avleiðing av, at partabrøvini í Vesturvón vóru seld.
Tað er ikki altíð, at ríkidømi kann mátast í peningi, og tí er tað við blandaðum kenslum, at kommunan tók ímóti teimum meira enn 40 mió. kr. Partapeningurin, sum varð settur í felagið, varð ætlaður sum arbeiðsskapandi tiltak fyri kommununa og sigast má, at hesin peningur hevur givið gott avkast.
Tann stóra peningaupphæddin kemur at hava stóra ávirkan á, hvussu fíggjarviðurskiftini hjá kommununi fara at verða tey komandi árini.

Samsvarandi fíggjarætlanini fyri 2006 er ætlanin at gera íløgur fyri uml. 23 mió. í 2006, og eru hesar íløgur í høvuðsheitum:

| | |
|---|---|
| Útstykking í Hagagerði: | kr. 2.500.000 |
| Byggibúgving ídnaðarøki: | kr. 2.000.000 |
| Sørvágs Havn: | kr. 3.130.000 |
| Vatnveiting: | kr. 1.263.000 |
| Brandbilur: | kr. 1.400.000 |
| Vegagerð o.a.: | kr. 3.750.000 |
| Barnagarður: | kr. 6.000.000 |

Umframt nevndu íløgur, samanlagt uml. kr. 20. mió, eru íløgur fyri uml. 3 mió. til liðugtgerð av verandi vegum, ávísari nýggjari vegagerð o.a.

**www.sorvag.fo**
Undanfarna bygdaráð tók stig til, at kommunan skuldi hava eina heimasíðu. Hetta er, umframt at verða "inn," eisini eitt gott amboð til at røkka longur út til borgaran. Síðan hevur verið virkin í nakrar mánaðar. Sigast má, at hon hevur verið sera væl vitjað - til í dag hava fleiri enn 11.500 vitjað síðuna.
Vón mín er, at heimasíðan kann verða eitt gott amboð, har borgarar merkja meira gjøgnumskygni í viðgerðunum.

**At enda**
Ikki ber til at spáa um framtíðina, og tað vil eg heldur ikki gera.
Sum áður nevnt, er møguleiki fyri at Vága Floghavn verður útbygd í 2007. Um hetta verður veruleiki, kann tá roknast við nógvum byggi- og anleggsvirksemi hjá okkum í hesum ári.
Hetta kann viðføra óvanliga nógv virksemi innan byggi og anleggsarbeiði, og hava vit tí avgjørt at leggja størri dent á útbyggingar og liðugtgerðir í árinum 2006 enn vanligt hevur verið, fyri soleiðis at avgreiða tey mál, sum sett eru út í kortið, og samstundis byrja menning av nýggjum ætlanum.

Fleiri og fleiri velja at búseta seg í okkara kommunu, hóast tey ikki hava fast arbeiði her, og skulu tit verða hjartaliga vælkomin.

Aftur í ár eru tað fleiri, sum á ymiskan hátt eru rakt av sorg og ólukkum. Tykkum minnist eg við djúpari samkenslu, við bøn um at Harrin má hjálpa tykkum.

Tað, sum skapar samfelag og samanhald, eru ikki tær umstøður vit skapa við peningi, men tað fólkið, ið her býr. Um vit øll í felag hava umsorgan og virðing fyri hvørjum øðrum, fáa vit eitt samfelag, har vit lyfta í felag.

Tykkum, sum á ymiskan hátt hugsa um bygd okkara og á ymiskan hátt gera hana vakra – eisini um nýggjárið, vil eg bera stóra tøkk.

*Ungur nemur gamal fremur*
*Maður í mansstað kemur*
*Skifta tíðir skifta kor*
*Ikki var altíð búgvið borð*
*Men Harrin innanborða var*
*Sum okkum Hann sá Hann okkum sær*
*Hann forløg okkara kennir*

At enda vil eg vegna bygdaráðið ynskja øllum borgarunum eitt av Harranum vælsignað nýggjár við tøkk fyri tað brátt farna.

*Gott nýggjár øll somul.*

Sørvágur, 30. desember 2005

Vinarliga

**Sørvágs Kommuna**

Jákup Suni Lauritsen

**Sørvágs Kommuna** **Fíggjarætlan 2006**

| | HØVUÐSYVIRLIT | Fíggjarætlan 2006 Útreiðslur | Fíggjarætlan 2006 Inntøkur |
|---|---|---|---|
| 1. | Byggibúning | 288.000 | 30.000 |
| 2. | Kommunal virki | 1.736.104 | 828.800 |
| 3. | Teknisk mál | 3.799.150 | 22.000 |
| 4. | Skúla- & mentunarmál | 4.407.932 | 247.000 |
| 5. | Almanna- & heilsumál | 6.729.120 | 1.922.327 |
| 6. | Kommunala fyrisitingin | 3.433.470 | 4.000 |
| **A.** | **RAKSTUR SAMANLAGT** | **20.393.776** | **3.054.127** |
| 1. | Byggibúning | 7.830.000 | 540.000 |
| 2. | Kommunal virki | 3.343.000 | 0 |
| 3. | Teknisk mál | 3.750.000 | 0 |
| 4. | Skúla- & mentunarmál | 1.628.995 | 0 |
| 5. | Almanna- & heilsumál | 6.000.000 | 0 |
| 6. | Kommunala fyrisitingin | 400.000 | 0 |
| **B.** | **ÍLØGUR SAMANLAGT** | **22.951.995** | **540.000** |
| **C.** | **RENTUR** | **0** | **675.000** |
| | Avdráttir av lánum | 0 | |
| **D.** | **AVDRÁTTIR AV LÁNUM** | **0** | |
| | **ÚTREIÐSLUR SAMANLAGT** | **43.345.771** | **4.269.127** |
| | Broyting í tøkum peningi | 0 | 14.963.799 |
| | Fíggjarbroytingar | 0 | 133.954 |
| **E.** | **FÍGGJARBROYTINGAR SAMANLAGT** | **0** | **15.097.753** |
| **F.** | **SKATTUR** | | **23.978.891** |
| | **FÍGGJAN SAMANLAGT** | **0** | **39.076.644** |
| | **JAVNVÁG** | **43.345.771** | **43.345.771** |

Góðkend á kommunustýrisfundi, tann 7/12-05

Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri

Jógvan Páll Joensen

Erik Davidsen

Jóhan á Ørg

Sune Jacobsen

Eileyg Weihe

Thordis Skaalum

**Bygdaráðsfundir í 2006**

Sørvágs Kommuna hevur ásett føstu almennu fundirnar fyri 2006. Fundirnir verða kl. 18:00 í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni hesar dagar:

Mikukvøldið 25. januar
Mikukvøldið 22. februar
Hóskvøldið 30. mars
Mikukvøldið 26. apríl
Mikukvøldið 31. mei
Mikukvøldið 28. juni
Mikukvøldið 27. september
Mikukvøldið 25. oktober
Mikukvøldið 29. november
Mikukvøldið 06. desember

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu verða kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

Eykafundir ella broytingar til omanfyrinevndu, verða lýstir í svørtutalvu við kommunuskrivstovuna.

------ o ------

Um tú ætlar at brenna bál nýggjársaftan, er neyðugt at søkja um loyvi frá Sørvágs kommunu. Tlf 21 05 04 innan 31. desember klokkan 12.00.

Treytirnar fyri at fáa loyvi eru hesar:

- at bert reinur og turrur viður verður nýttur.
- at veðrið er til vildar.
- at økið verður ruddað skjótast gjørligt dagin eftir.
- at navnsnevndur ábyrgarpersónur verður uppskrivaður hjá kommununi.

Hesar treytir skulu tryggja, at bálbrenningin verður gjørd við skynsemi, umframt at minst møgulig umhvørvisárin standast av brenningini.

**Sørvágs Kommuna**
Varðagøta 8
FO-380 Sørvágur
Tel. +298 33 20 04
Fax. +298 33 29 52
www.sorvag.fo
sorvag@sorvag.fo